ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

1. apríl 2022
Mál: 22/06130
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Barbara Álvsdóttir Thomsen

Nr. 52-151/2021

Svar upp á § 52a fyrispurning nr. 52- 151/2021 frá Eyðgun Samuelsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Sólvit E. Nolsø, um talsfólk á brekøkinum

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

1. Arbeiðir landsstýrismaðurin við at seta eitt talsfólk á brekpolitiska økinum?
2. Um so er, nær kann væntast, at klárt er at seta talsfólkið?
3. Hvar verður talsfólkið staðsett?

Til nr. 1 og 2

Ætlanin er at fara undir arbeiðið at fáa eitt talsfólk til brekpolitiska økið. Landsstýrismaðurin hevur sett hetta á skrá til komandi tingsetu.

Áðrenn gongd er komin á arbeiðið við at fáa eitt brektalsfólk er tað ikki møguligt neyvt at siga, nær eitt talsfólk er klárt at seta, men landsstýrismaðurin hevur góðar vónir um, at hetta verður í 2023.

Til nr. 3

Tað ber ikki til hjá landsstýrismanninum at siga nakað um, hvar talsfólkið verður staðsett áðrenn farið er undir arbeiðið.

Almannamálaráðið 1. apríl 2022

Sólvit E. Nolsø
landsstýrismaður

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo